HEILSUMÁLARÁÐIÐ

12. apríl 2024
Mál: 24/07635-5
Viðgjørt: BL

# Semjuskjal

Tann 13. september 2023 varð Álit um universitetssjúkrahús handað. Í álitinum verður lýst, hvat skal til fyri at fyrireika Sjúkrahúsverkið til at gerast universitetssjúkrahús. Tilmælir eru um, hvussu Sjúkrahúsverkið kann skipast sum universitetssjúkrahús. Nøkur av tilmælunum viðvíkja bæði heilsumál og barna- og útbúgvingarmál.

Landsstýriskvinnan í heilsumálum og landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum eru samd um, at tilmælini, ið viðvíkja bæði heilsumál og barna- og útbúgvingarmál í álitinum, skulu setast í verk.

Ein av fortreytunum fyri, at Sjúkrahúsverkið kann gerast universitetssjúkrahús er, at ein formlig avtala verður gjørd ímillum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið um samstarv viðvíkjandi heilsugransking og undirvísing.

Avtalur hava verið millum Fróðskaparsetur Føroya, Landssjúkrahúsið og Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í Sjúkrahúsverki Føroya um Depil fyri Heilsugransking. Talan var um eitt virtuelt granskingarsamstarv. Harumframt vóru avtalur um granskingarsamstarv ímillum Fróðskaparsetrið, Landssjúkrahúsið og Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Avtalurnar vóru undirskrivaðar í 2014.

Í januar 2023 varð Heilsugranskingareindin innan Sjúkrahúsverkið sett á stovn. Leiðari fyri Heilsugranskingareindina varð settur í starv í juni 2023.

Neyðugt er tí at gera nýggja samstarvsavtalu ímillum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið um heilsugransking og undirvísing.

Landsstýriskvinnan í heilsumálum og landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum eru samd um, at avtala skal gerast ímillum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið um samstarv viðvíkjandi heilsugransking, útbúgving og vitanardeiling v.m. og at hetta arbeiðið verður sett í gongd skjótast gjørligt.

Tórshavn, tann 12. Apríl 2024

Margit Stórá,
landsstýriskvinna í heilsumálum

Djóni Nolsøe Joensen,
landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum